SOSIALURIN

Nr. 91 — 20. NOVEMBER 1965 — 38 ÁRG

STILLISLIGA

SO SPAKULIGA OG STILLISLIGA ARBEIÐA TEIR — GANGA IVALEYST Á TÁ OG TESKA TIL HVØNN ANNAN, TÁ TEIR FÝRA STÓRU Í TINGANESI VIÐ SÍNUM STJÓRUM FULLTRÚÐUM OG BÚSKAPARMONNUM LEGGJA TIL RÆTTIS OG — KANNA

Tað er framvegis sama tógvið á snælduni úti í Tinganesi, um eftirfarandi er, hvat »14. sept.« sigur. Teir kanna við sama lag úti í Tinganesi — kanna og kanna.

Í trý ár hava teir — kannað.

Skjótt byrjar fjórða árið, og við sama lag — kanna teir.

Valskeiðið er skjótt runnið.

Tað verður løgið einki annað at hava at svara, tá menn spyrja, hvat varð burtur úr teimum mongu, stóru, háfloygdu og glógvandi lyftum, — uttan »vit hava kannað tey!!!«

Tað er væl, at mál verða gjølla kannað, men ov langar kanningar, 2 og 3 ára gamlar kanningar — bara kanningar, ja, kanska framtíðarkanningar — loysa eingi mál og eru ikki nógv at liva av hjá Føroya fólki.

Hýss! spakuliga! stillisliga!

Friður á foldum!

Teir kanna ...!

Fakuu

»RAÐAR« TIL TEY BLINDU

Meksikanski fysikarin dr. Armando del Campo visti nýliga á universitetinum í Meksiko City eitt elektroniskt tól, sum skapar líkindi hjá blindum fólkum at síggja við at senda impulsir, framkallaðar av ljósrefleksum, beinleiðis inn í heilan.

* Tólið er framvegis á einum
* granskingarstøði. Tað er dýrt
* og so stórt, at tað er trupult
* at flyta tað við sær. Einaferð,
* segði dr. del Campo, verður
* tað gjørligt at lata blind menn-
* iskju fáa smá, løtt sjóntól á
* sama hátt sum deyv í dag
* kunnu fáa hoyritól.

NB. Tíðindini eru sjálvandi ógvi liga áhugaverd; men ein skal tó leggja sær í geyma, at mangan hevur verið boðað frá nýggjum uppfinningum, medisini og læknaviðgerðum, sum skuldu hjálpa sjúkum og brekaðum; men sum ikki roynd-ust, sum boðað var frá. Hetta verður lagt aftrat fyri ikki at skapa falskar vónir.

Eygað

LØGMAÐUR TJÓÐVELDISMANNA

Tá ið kongsjørðin skuldi yvirtakast skuldsettu tjóðveldismenn Hákun Djurhuus fyri at hava »stolið« uppskot frá teimum. 28. febr. 1956 skrivaði »14. sept.« um hetta mál:

»Ikki fyrr enn Hákun hevði lagt fram uppsot sitt, slapp framløgumaður tjóðveldisflokksins, Hanus við Høgadalsá, framat við ti uppskoti, sum hann hevði handað løgtingsformanninum longu friggjadagin.

Eina ferð enn visti Hákun, hvussu lítil maður, hann er. Látur var í tingsali og á áhoyrarapalli.«

BRÆV í kassan

Sosialurin.

Loyvi mær at spyrja, um tað er rætt, at ein fiskimaður t. d. kann fáa fólkapensjón, áðrenn hann er 67 ár, um so er, at hann ikki er arbeiðsførur meira á sjónum.

Fiskimaður.

SVAR: Ein fiskimaður, ið noyðist at fara í land — hóast ikki avlamin — men illa arbeiðsførur av so manga aðrastaðni — eru teymarnir linari.

* 10 miljónir eintøk av Sherlok-
* Holmes-bókunum eru seldar í
* Sovjetsamveldinum, og sølu-
* menninir hava vunnið í minsta
* lagi 45 miljónir kr. uppá hetta
* risasalg. Skaldið og arvingar
* hansara hava tó ikki fingið
* eitt oyra burtur av hesum
* miljónunum, tí Sovjet hevur
* ikki undirritað Genfer-sátt-
* málan, ið tryggjar rættindi rit-
* høvundans.

BOPPI

* tykist tað marghátligt, at
* landsstýrissamgongan kann
* halda áfram, tá ið Dagblaðið
* beint aftaná samgongustiið
* skrivaði, at beinanvegin í 1963
* visti tað seg, at landsstýrið var
* óarbeiðsført — ella teir ætla
* kanska bara at sita og **einki**
* gera.

VÆL SAGT!

Filosoffurin vónar at menniskjuni verða klókari, og sogumaðurin prógvar, at hetta ikki passar.

(Satre)

* * *

Nógvir ektamenn eru slopnir undan at verða til láturs, tí kvinnurnar ikki hava sans fyri humor.


(Paul Rigand)

* * *

Vit byggja tað góða í okkum, tá vit gera tað góða **uttan um** okkum.


(Arne Garborg)

Krossorð



Yvir: 1) fruktir 6) líkamslutur 7) roykt 9) flenti 10) múgvandi 12) dugulig 14) beinagrind 16) tóni 17) burtur 19) djór.

Niður: 1) tennis 2) undir fóti 3) glað 4) horn 5) amboð 8) hygg! 11) spreingievni 13) drykkur 15) eystan 18) sjálvljóð.



1) gera 2) riva 3) land 4) lýsa 5) fiskur 6) fuglar 7) tog.

Spurningar

1) Hvar er plumbuddingur tjóðarrættur?
2) Hvar í USA liggur Omaha?
3) Hvat merkir noninterventión?
4) Hvat er mótvegis netto?
5) Hvat merkir scepter?

SVAR uppá 5 spurningar:

1) í Bretlandi 2) Nebraska 3) ikki uppliðegáing 4) brutto 5) herskara-stavur.

Veistu tað?

AT David, kongur ísraelsmanna sambært bibliuna átti 103.000 talentir í gulli og 1.007.000 talentir í silvuri. Amerikumaður hevur roknað út, at hetta svarar til 6 milliardir dollars (meir enn 40 milliardir krónur); men um munurin í keypikraftini tá og nú verður tikin við, vildi hetta í dag svarað til 120 milliardir dollars.

AT eitt eldgos ikki altíð goysir frá sær lava. Tað eru dømi um eldgos í Suður-Italia, ið hava goyst bara kókað vatn og — fisk.

AT eingin veit við vissu, hvaðan zigeunararnir koma frá, men eftir málinum at døma eru teir ættaðir frá einari gamlari indiskari hinduætt, sum rýmdi til Europu fyrst í 14. øld.

dimma Grón MERGJAR

Skipafelagið Føroyar

greiðir allan fluttning

á sjógvi
á landi
í luftini

Bíleggið ferðaseðlar

Pf. Skipafelagið Føroyar

Tlf. 1225

Rímsmiðjan

»SKRALLISPANNA-POLITIKKUR«

Knút Wang er nú so illa á holdum komin, at hann í politiskum máttloysi einki veit at taka sær fyri uttan at »servera« dunstin av »skrallikøksspannunum« hjá andstøðumonnum fyri lesarum sínum.

Tá onkur Knúti gongur
í politikki nakað nær,
og hann fyri stavni
sær onga verju sær,
Knútur kvikur leitar
upp um lægsta garð,
men sjálvt um Knútur
einki heldur finnur har,
í einum hvørjum skápi
hann meira leita man.
Á, sum Knútur brosaði,
tá hann endiliga fann
í ringum deymaskápi
eina dunstur-skrallispann.
Henda dunsturspann
er Knúti hjartans kær,
tí tann, ið ikki eingil Knút
nóg gudabornan sær,
í nasarnar úr spannini
eina dunstur-bumbu fær.


BARNA-MATUR

HVAT ER HON? Set bókstavirnar í navninum øðrvísi saman, og tú fært at vita, hvat kvinnan er:

STINA ROG

* * *

KLOKKUGÁTA. Væl gitað fært tú samanlagt navn á avtiknum læru stovnum:



1—2 1001, 2—5 óðu 6—7 stytting 8—11 høgl 1—12 jarðamál.

hugskot

SJÁLVSTÝRI

Nú saman um kom, tykjast teir sokallaðu »sjálvstýrisflokkarnir« ikki so sterkt hugaðir at fara undir ella taka við meira sjálvstýri, enn vit longu hava vunnið. Teir kanska minnast aftur á kongstalu J. Paturs sonar í juli 1907:

»... Når vi fjeldets sønner og døtre siger til Danerne, der bor på sletten: Der er ingen af os, ikke **en eneste en**, der ønsker at skilles fra eder, men vort ønske er godt samliv under fælles krone, da tror jeg at de vi sætte pris på et sådant håndslag. Vore forfædre har på tinge i Thorshavns by svoret mange danske konger huldskab og troskab. HIL OG SÆL DANEVÆLDE!«



— Tað er vorðin so nógvur tollur uppá rúsdrekka, at tað skjótt verða fleiri prosent uppá eina akvavitfløsku, enn tað eru í henni!

* * *

Stjórin: Ja, ungi maður, okkum tørvar sanniliga ein ábyrgdarkennandi mann til starvið.

Umsøkjarin: Ja, so hóskar starvið væl til mín, tí har eg var seinast, søgdu teir, hvørja ferð tað gekst illa, at tað var eg sum hevði ábyrgdina.

* * *

Fólk angra tað, tey hava gjørt, sjálvt um tað ofta er meira grund til at angra tað, tey ikki hava gjørt.

* * *

Læknin: Tygum eru frískur sum ein fiskur, tygum kunnu í minsta lagi liva, til tygum eru 80.

Gamli: Ja, men eg eri 80.

Læknin: Ja, har siggja tygum.

SJÓVINNA

Farin úr skipaflotanum

Serstakliga nokur tey seinri árini og eitt nú í tíðini aftaná heimsbardagan komu nógv skip til landi; men eisini nógv eru farin burtur av

Niðanfyri er stutt yvirlit, hvussu mong skip eru burturgingin, seld av landinum ella upphøgd. Aftrat hesum tølum er at leggja 24 skip, ið fóru av kriggsávum 1940—45.

BURTURGINGIN

	tal	tons
1940—1945	14	1.619
1946—1950	11	2.251
1951—1955	13	1.878
1956—1960	6	1.194
1961—1964	8	1.889

SELD ELLA UPPHØGD

ár	tal	tons
1940—1945	9	1.454
1946—1950	13	2.169
1951—1955	31	12.378
1956—1960	16	4.043
1961—1964	33	4.362

Samanlagt verður hetta 178 skip, sum farin eru av kriggsávum, burturgingin, seld av landinum ella upp høgd — meira enn 7 skip upp á árið.

Bókur-blað

BÓKAÚTGÁVA Í SOVJET

Tað er ikki so nógv gull at spinna úr bókaútgávu hjá útlendingum í Sovjet. Áður hava russisku myndugleikarnir ikki verið so ovurfegnir fyri vesturlendskum lesnað; men á hesum øki — sum

D. F. D. S.

Ekstraskib afsejler ca 6. **december** fra København med gods til **Thorshavn.**

Ms. **STAVOS** afsejler planmæssigt fra København 3. december til Klaksvig, Tveraa og Reykjavik (Thorshavn anløbes ikke denne rejse for opgaaende).

D.F.D.S. EKSPEDITION I THORSHAVN
H. C. MÜLLER